VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av suðri og sirm ella mjørki av og á, men eisini sólglottar. Hitin millum 15 og 18 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, serliga mánadagin. Hitin millum 10 og 14 stig.

DAGSINS FERÐAFÓLK

"Føroyar eru eisini ein partur av verðini"

Við Norrönu seinnapartin í dag fara tvey ferðafólk til Íslands. Hesi bæði - hjúnini Anneke van Oorde og Gerard Kooprans úr hollendska býnum Arnhem - hava bara gott at bera føroyingum.

Dagsins ferðafólk
Orð: Snorri Brend
Mynd: Jens Kr. Vang

Anneke van Oorde og Gerard Kooprans úr hollendska býnum Arnhem hava alt gott at bera føroyingum

Hvussu ber tað til at tit komu til Føroyar?
- Vit eru ávegis til Íslands, og tí steðga vit her tveir dagar. Men Anneke hevur altíð vilja sloppið til Føroyar. Tá vit so sóu, at vit máttu umvegis Føroyar til Íslands, var tað bara í finasta lagi. Føroyar eru jú eisini ein partur av verðini.

Hvat halda tit um Føroyar sum ferðamannaland?
- Vit mugu bara siga, at vit eru stórliga bilsin. Gerard er limur í einum Landrover-felagi, og har høvdu tey fleiri myndir úr Føroyum. Hesar myndirnar vístu bara mjørka, men hann hava vit ikki sæð her. Her hevur verið sól allar tríggjar dagarnar, vit hava verið her. Vit hava telt við, men valdu ikki at taka nakran tjans við tí, orsakað av veðrinum. Ístaðin búgva vit við bed&breakfast, men nú kunnu vit siga, at tað hevði kanska ikki verið neyðugt.

Hvat hava tit upplivað undir vitjanini?
- Vit hava sæð og upplivað nógv. Vit vóru m.a. ein gongutúr norðuri í Gjógv. Har upplivdu vit tað sjáldsama at lundin fleyg úr holum sínum 2-3 metrar frammanfyri okkum. Vit hava eisini verið við báti undir Vestmannabjørgunum, og vit mugu bara siga, at her er sera vakurt.

Hvussu eru føroyingar?
- Vit hava bara møtt vinarligum fólkum. Anneke er vegatarur, og tað hevur ikki verið nakrar trupulleiki at fáa tann matin, sum hon ynskti sær. Í handlunum eru fólk eisini sera vinarlig.

Nakrar viðmerkingar annars?
- Ja, tað undrar okkum almikið, at ein ikki kann keypa feskan fisk nakrastaðni. Tit liva jú av fiski, men hann er bara ikki at fáa til keyps nakrastaðni!

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	11
Qaqortoq	7
Ammassalik	6
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	12
Lerwick	12
Aberdeen	15
London	30
Tromsø	--
Bergen	19
Oslo	--
Stokkhólm	28
Keypmannah.	26
Helsinki	25
Moskva	16
Berlin	27
Warzawa	24
Kiev	23
Bukarest	24
Paris	30
Madrid	29
Róm	29
Malorca	29
Athen	23
Malta	33
Tunis	37
Beijing	31
New Dehli	38
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	13
New York	31
Miami	30
Los Angeles	26
Meksikobýur	23
Panama	30
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	18

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 989 hPa. vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing.



Í dag:
Lágtrýstið yvir Íslandi stendur mestsum í stað. Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 3/7 kl. 06^{00}– 4/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í apríl: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0 mm – mált frá 3/7 kl. 06^{00}– 4/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í apríl: 12 mm

VESTFALLSKYRRINDI

3. juli	Fyrra kvarter
4. juli	Jørðin longst frá sólini
11. juli	Fullmáni
13. juli	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
5. Juli	02.47	15.06	01.47	14.06	02.02	14.21	04.47	17.06	05.47	18.06	01.02	13.21	00.02	12.21	03.02	15.21	04.02	16.21	02.32	14.51	03.47	16.06
6. Juli	03.25	15.45	02.25	14.45	02.40	15.00	05.25	17.45	06.25	18.45	01.40	14.00	00.40	13.00	03.40	16.00	04.40	17.00	03.10	15.30	04.25	16.45
7. Juli	04.06	16.29	03.06	15.29	03.21	15.44	06.06	18.29	07.06	19.29	02.21	14.44	01.21	13.44	04.21	16.44	05.21	17.44	03.51	16.14	05.06	17.29
8. Juli	04.52	17.19	03.52	16.19	04.07	16.34	06.52	19.19	07.52	20.19	03.07	15.34	02.07	14.34	05.07	17.34	06.07	18.34	04.37	17.04	05.52	18.19
9. Juli	05.46	18.13	04.46	17.13	05.01	17.28	07.46	20.13	08.46	21.13	04.01	16.28	03.01	15.28	06.01	18.28	07.01	19.28	05.31	17.58	06.46	19.13

Sosialurin

5 707265 100043 >